

Eitt ára gamla Erla spælir dukkustell saman við Evu Joensen, ein av teim 16 starvsfólkunum í Barnahúsinum Margit



Dánjal, Mortan, George og Jacob hugna sær saman við Niels Juel Arge, sum arbeiddi á Bedingini, áðrenn hann kom til Barnahúsið.

# perlum

okkum týðulig mál, heldur Hedvig Høgnesen

Teir seinastu fjúrtan dagarnar hava starvsfólk og leiðari saman útgreina eitt meira ítøkiligt virðisgrundarlag og sett orð á, hvussu hetta skal síggjast aftur í gerandisdegnum.

Hugsjónin at hava sunn og trygg børn er til dømis útgreina í reinføringspolitikki, roykibanni, frukttilboði og rørslupolitikki. Royking er fullkomiliga bannað á stovninum, børnini fáa frukt hvønn dag, og foreldrini hava fingið greið boð um, at børnini skulu hava sunnan og mettandi mat í matpakkanum, og at tað er ikki loyvt at hava góðgæti og kakur við. Hvønn morgun er so eisini ætlanin at hava fimleik á skránni.

Hedvig Høgnesen ynskti eisini, at stovnurin hevði ein greiðan alkoholpolitik. Klaksvíkar Kommuna hevur ikki fyrr havt ein orðaðan alkoholpolitik, men nú eru fyribils reglur gjørdar fyri Barnahúsið Margit, og ætlanin er, at hesar eisini skulu fáa gildið í hinum stovnunum.

## Alt skal hava eina meining

Barnahúsi Margit hevur eisini námsfrøðiligt umhugsni sum eitt aðalmál. Hetta skal sambært leiðaranum síggjast aftur í, at børn ikki bara verða passaði, men stuðlað í teirra menning og búning.

- Alt skal hava eina meining. Vit hava ongin sjónvørp, tí børnini skulu ikki bara setast til at hyggja eftir filmum fyri at binda frið. Men vit hava keypt ein uppvarpara og góðar rullugardinur, so onkran dag fara vit at spæla biograf við góðum filmi og poppkorn afturvið, sigur Hedvig Høgnesen.

Hon ætlar heldur ikki, at húsið bara skal fyllast við leikum, men at leikurnar verða keyptar og brúktar, tí tær kunnu vera við til at stimbra barnið. Í túninum stendur eitt stórt krabba akvarium, og skjótt fer eitt stórt kaninbúður at standa við síðuna av, tí djór skulu hava sín leiklut í námsfrøðiligu menningini.

Eitt annað námsfrøðiligt amboð, sum tey fara at brúka í barnahúsinum, eru smiley talvur.

- Tá eg arbeiddi á frítíðarskúla, uppdagaði eg, hvussu ofta børnini endaðu í fastlastum støðum, tí tey heilt einfalt ikki dugdu at avlesa anlitsbrøgdini hjá hvørjum øðrum. Tey dugdu ikki at síggja, um hini vóru bangin, kedd ella óð. Smiley talvurnar skulu læra tey at skilja hvønn annan, greiðir Hedvig Høgnesen frá.

Stovnurin skal eftir ætlan vera páppírsfríur við teldum og interneti á hvørjari stovu. Men skrivstovan hjá leiðaranum hevur enn hvørki skrivaraborð ella teldu.

- Vit eru ikki fullkomin enn, sigur Hedvig Høgnesen smílandi.

- Men eg haldi tað er betur, at vit seta okkum mál um bæði teldur, frukt og fimleik og arbeiða fyri at málini verða nádd í staðin fyri bara at seta okkum niður og bíða eftir tí perfekta, sigur hon at enda.



Nógv er at takast við í nýggja barnagarðinum. Her hevur Páll sett seg at spæla við ein flottan bil

